Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Fróðskaparsetrið og kampusætlan

Spurningar:

1. Nær kann væntast, at farið verður undir at byggja kampus á Frælsinum?
2. Hvussu nógv verður eitt kampus á Frælsinum mett at kosta at byggja?
3. Metir landsstýrismaðurin, at avsettu upphæddirnar á fíggjarlógini fyri ætlanarárini 2023 og 2024 eru nøktandi?

Viðmerkingar:
Samstarvsavtala er gjørd millum Mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um at staðseta eitt komandi kampus ímillum J.C. Svabosgøtu og Frælsið í Havn. Samstarvsavtalan fevnir um bygningarnar á Frælsinum og um broytingar í byggisamtyktum. Hetta síðsta er eitt arbeiði, sum Tórshavnar kommuna skal standa fyri.

Um dagarnar frættist eisini, at ein arkitektakapping skal gerast um eitt kampus á Fræsinum, umframt at ein byggiskrá skal gerast. Tað er landið, sum stendur fyri hesum arbeiði, og eru 5 mió. kr. játtaðar til hetta arbeiðið á fíggjarlógini fyri 2022, meðan ávikavist 12 mió. kr. og 32 mió. kr. eru settar á fyri ætlanarárini 2023 og 2024.

Tað sum er áhugavert at vita er, um tað veruliga arbeiðið kann fara í gongd í 2023 og um nøktandi peningur verður settur av til hesa bygging á fíggjarlógini. Tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 26. apríl 2022

Annika Olsen